**Kapping: Norðurlendsk Orkukommuna 2011**

Norðurlendska Ráðharraráðið hevur útskrivað kapping at finna kommunu í hvørjum norðanlandi, ið leggur dent á burðardygga menning innan orkunýtslu. Talan er her um fremjan av serstøkum átøkum og verkætlanum, ið kunnu minka um oljunýtsluna og harvið eisini um útlátið av koltvíiltu (CO2).

Í norðurlendska samstarvinum hevur Ráðharraráðið sett orku og veðurlagsevnið á skránna sum sera týdningarmikið mál har visiónin er at broyta samfeløgini frá jarðbundnu og ikki varandi orkuveitingina til eina burðardygga, varandi og CO2 fríða orkuveiting. Endamálið er at norðurlendska samstarvið skal vísa á ítøkiligar og haldbarar loysnir at minka um koltvíiltuútlátið og at tryggja framtíðar orkuveitingina.

Allar norðurlendskar kommunur verða bodnar at luttaka í kappingini Norðurlendsk Orkukommuna 2011. Til at kunna luttaka skal kommunan senda inn umsókn, har greitt verður frá serstakari og slóðbrótandi orkuverkætlan, ið er í fyrireikingum at verða framd ella, sum er framd.

Í fyrstu atløgu verða 3 kommunur úr hvørjum landi valdar at hava bestu verkætlaninar. Næst, á várinum 2011, verður domsnevnd so at finna ein vinnara millum øll luttakandi londini, ið fær heitið Norðurlendska Orkukommunan 2011.

Freistin at senda inn umsókn at luttaka í kappingini er:

**Hósdagin 20. januar 2011 kl. 12.00**

Ein og hvør føroysk kommuna kann luttaka í kappingini, og skal, fyri at koma upp í part, hava framt serstakt átak innan orkuøkið og hava framt einhvørja slóðbrótandi orkuverkætlan:

- Kommunala orkuverkætlanin er at skilja sum ein verkætlan, sum er partur av bygnaðinum hjá kommununi, kortini er ikki avgerandi neyðugt at kommunan er verkætlanarleiðari.
- Verkætlanin skal fevna um átak innan varandi orku og/ella hava í sær orkusparingar-endamál.
- Verkætlanin skal hava í sær burðardyggan vøkstur og menning í økinum og stuðla undir visiónina um samfelag grundað á varandi orkuveiting og neutralt CO2-útlát.

Í hvørjum norðurlandi og sjálvstýrandi øki er dómsnevnd sett og ger hon hvør sær av vinnaran.

Umsókn um luttøku í kappingini skal sendast teldutøk til Jarðfeingi við hesu adressu:
kari.mortensen@jardfeingi.fo
Eru spurningar kann ringjast til Jarðfeingi, tlf. 357000

Um áhugi er at luttaka í kappingini Norðurlendsk Orkukommuna 2011, kann Agenda 21 Stovan geva ráð og vegleiða.

Heimasíða og umsóknarskjal kann finnast her:
http://www.nordicenergymunicipality.org/index.html
http://www.nordicenergymunicipality.org/application/application_material.html